Jonhard vann marathon

Jonhard Larsen úr Treystinum var samanlagt góðar tveir minuttir undan næsta manninum, og vann sostatt Daewoo-Marathon kappingina

RENNING
Jákup Mørk

Seinasta umfarið í Daewoo marathon kappingini var runnið um vikuskiftið. Hesa ferð var talan um hálva sætta kilometurin, sum rennast skuldi á Kambsdali, og sum var endin á teimum 42.195 metrunum, sum rennast skuldu ialt.

Hesin teinurin svarar til samlaðu longdina á marathon-teininum, og eftir at allar tíðirnar vórðu taldar saman, var Jonhard Larsen úr Treystinum tann, sum hevði nýtt stytst tíð samanlagt. Jonhard var eisini rennarin, sum var fyrstur á mál á Kambsdali, og styrkti hann soleiðis um oddastøðuna, sum hann hevði undan kappingini.

Hjá kvinnunum var eingin samlaður vinnari, tí eingin hevði tikið lut í øllum kappingunum, men tað má kennast sum hugagott hjá fyriteikarunum, at í øllum hinum bólkunum vóru fleiri rennarar, sum tóku lut allan vegin.

Úrslitið av kappingini á Kambdsdali og samlaða úrslitið av kappingini framgongur av yvirlitinum niðanfyri.

Á Kambsdali

Kvinnur (f. 1958-85) 5,595 km

nr.	Fornavn	Eftirnavn	Árgang	Felag	
1	Ramona	Petersen	1975	Gøtu	30.35

Menn (f. 1958-85) og veteranar (f. -1957) 5,595 km

nr.	Fornavn	Eftirnavn	Árgang	Felag	
1	Jonhard	Larsen	1966	Treysti	19.53
2	Sam	Vang	1970	Bragdið	20.17
3	Sigurð B.	Justinussen	1967	Bragdið	20.26
4	Trygvi	Hansen	1966	Bragdið	21.30
5	Súni	Jacobsen	1967	Bragdið	21.44
6	Óla Jákup	Kristoffersen	1959	Bragdið	22.28
7	Steindor	Hjaltalin	1949	Bragdið	22.55
8	Flemming	Petersen	1960	Bragdið	23.01
9	Ólavur Herup	Olsen	1943	Bragdið	23.21
10	Henning Clemens	Poulsen	1951	Bragdið	23.40
11	Robert	Vilhelmsen	1951	Bragdið	24.06
12	Holger	Arnbjerg	1951	Bragdið	25.05
13	Torry	í Bartalstovu	1961	Gøtu	26.20
14	Hans Birgir	Hansen	1949	Bragdið	28.58

Gentur-7 (f. 1996-) 359m

nr.	Fornavn	Eftirnavn	Árgang	Felag	
1	Durita	Skoradal	1996	Roysnið	1.28
2	Bjørk Reynagarð	Svabo	1996	Miðvágur	1.31
3	Maria	F. Christiansen	1996	Norðdepil	1.42
4	Sonja	Davidsen	1996	Miðvágur	1.46

Dreingir -7 (f. 1996-) 359m

nr.	Fornavn	Eftirnavn	Árgang	Felag	
1	Ólavur	Joensen	1996	Bragdið	1.27
2	Steingrímur	Hallsson	1997	Bragdið	1.29
3	Osvald	á Marknagili	1996	Klaksvík	1.30
4	Heðin	Gregersen	1996	Klaksvík	1.31
5	Bartal	Wardum	1997	Tórshavn	1.39
6	Beinir	Johannesen	1997	Treysti	1.50
7	Julian	Gregersen	1998	Klaksvík	2.25
8	Friði	Magnussen	2000	Bragdið	3.29

entur -10 (f. 1993-95) 359m

nr.	Fornavn	Eftirnavn	Árgang	Felag	
1	Rebekka	Fuglø	1993	Norðdepil	1.13
2	Katrin S.	Wardum	1995	Tórshavn	1.26
3	Natasja	Petersen	1994	Gøta	1.53

Dreingir -10 (f. 1993-95) 359m

nr.	Fornavn	Eftirnavn	Árgang	Felag	
1	Rúni	Seloy	1994	Bragdið	1.06
2	Jóhan á Plógv	Hansen	1994	Bragdið	1.08
3	Øyvind	Lützen	1993	Bragdið	1.12
4	John Viljam	Johannesen	1995	Treysti	1.14
5	Regin	Joensen	1995	Bragdið	1.21
6	Einar	Gregersen	1995	Klaksvík	1.29

Gentur -13 (f. 1990-92) 840m

nr.	Fornavn	Eftirnavn	Árgang	Felag	
1	Bjørk Herup	Olsen	1991	Bragdið	2.52
2	Jenny	Svabo	1990	Bragdið	2.58
3	Bjørg	Seloy	1992	Bragdið	3.22
4	Christa R.	Weihe	1991	Bragdið	3.35

Dreingir -13 (f. 1990-92) 840m

nr.	Fornavn	Eftirnavn	Árgang	Felag	
1	Robin	Jønsson	1990	Roysnið	2.43
2	Daniel	Djurhuus Rein	1990	Vestmanna	2.59
3	Jan Elmar	Sørensen	1991	Treysti	3.00

Dreingir -17 (f. 1986-89) 840m

nr.	Fornavn	Eftirnavn	Árgang	Felag	
1	Álvur	F. Christiansen	1989	Treysti	2.50

Samlaða úrslitið í kappingini

Menn		árg.	Havn 21,1 km	Klaksvík 5 km	Toftir 10,5 km	Kambsdalur 5,595 km		Ialt 4 umfør Marathon	
1 Jonhard Larsen	Treysti	1966	1.21.51	17.55	39.08	19.53	=	2:38:47	tím
2 Sigurð Justinussen	Bragdið	1967	1.22.18	18.02	40.08	20.26	=	2:40:54	tím
3 Sam Vang	Bragdið	1970	1.26.02	18.51	40.30	20.17	=	2:45:50	tím
4 Suni Jacobsen	Bragdið	1967	1.28.57	19.49	43.19	21.44	=	2:53:49	tím
5 Trygvi Hansen	Bragdið	1966	1.30.14	19.37	42.43	21.30	=	2:54:04	tím
6 Óla Jákup Kristoffersen	Bragdið	1959	1.38.43	21.01	45.37	22.48	=	2:58:09	tím
7 Ólavur Herup Olsen	Bragdið	1943	1.37.27	21.08	46.25	23.21	=	2:58:21	tím
8 Henning C. Poulsen	Bragdið	1951	1.38.58	21.04	47.01	23.40	=	3:10:43	tím
9 Flemming Petersen	Bragdið	1960	1.41.31	22.06	45.54	23.01	=	3:12:32	tím
10 Holger Arnbjerg	Bragdið	1951	1.51.43	23.11	50.04	25.05	=	3:30:03	tím
11 Hans Birgir Hansen	Bragdið	1949	2.10.41	25.06	59.54	28.58	=	4:04:39	tím

Veteranar		árg.	21,1 km	5 km	10,5 km	5,595 km		Marathon	
1 Ólavur Herup Olsen	Bragdið	1943	1.37.27	21.08	46.25	23.21	=	2:58:21	tím
2 Henning C. Poulsen	Bragdið	1951	1.38.58	21.04	47.01	23.40	=	3:10:43	tím
3 Holger Arnbjerg	Bragdið	1951	1.51.43	23.11	50.04	25.05	=	3:30:03	tím
4 Hans Birgir Hansen	Bragdið	1949	2.10.41	25.06	59.54	28.58	=	4:04:39	tím

Gentur -7 (f. '96 ella seinni)		Havn árg.	Klaksvík 500 m	Toftir 700 m	Kambsdalur 600 m	359 m		Ialt 4 umfør 1/20 Marathon	
1 Durita Skoradal	Saltnes	1996	2,25	3,03	2,50	1,28	=	9,46	min
2 Bjørk Reynagarð Svabo	Miðvágur	1996	2,18	3,29	3,01	1,31	=	10,19	min

Dreingir -7 (f. '96 ella seinni)		árg.	500 m	700 m	600 m	359 m		1/20 Marathon	
1 Ólavur Joensen	Bragdið	1996	2,08	2,54	2,37	1,27	=	9,06	min
2 Steingrímur Hallsson	Bragdið	1997	2,02	3,00	2,48	1,29	=	9,19	min
3 Beinir Johannesen	Treysti	1997	2,23	3,06	2,34	1,50	=	9,53	min
4 Bartal Wardum	Tórshavn	1997	2,13	3,39	3,06	1,39	=	10,37	min

Gentur -10 (f. '93 - '95)		árg.	500 m	700 m	600 m	359 m		1/20 Marathon	
1 Katrin S Wardum	Tórshavn	1995	2,17	3,07	2,34	1,26	=	9,24	min

Dreingir -10 (f. '93 - '95)		árg.	500 m	700 m	600 m	359 m		1/20 Marathon	
1 Jóhan á Plógv Hansen	Bragdið	1994	1,39	2,23	2,06	1,08	=	7,16	min
2 Øyvind Lútsen	Bragdið	1993	1,40	2,27	2,15	1,12	=	7,34	min
3 John Viljam Johannesen	Treysti	1995	1,49	2,30	2,29	1,14	=	8,02	min
4 Regin Joensen	Bragdið	1995	1,55	2,39	2,24	1,21	=	8,19	min

Gentur -13 (f. '90 - '92)		árg.	1.000 m	870 m	1.609 m	840 m		1/10 Marathon	
1 Jenny Svabo	Bragdið	1990	3,37	2,59	6,25	2,58	=	15,59	min
2 Christa R. Weihe	Bragdið	1991	4,05	3,14	7,25	3,35	=	18,19	min
3 Bjørg Seloy	Bragdið	1992	4,12	3,43	7,51	3,22	=	19,08	min

Dreingir -13 (f. '90 - '92)		árg.	1.000 m	870 m	1.609 m	840 m		1/10 Marathon	
1 Robin Jønsson	Roysnið	1990	3,18	2,41	5,47	2,43	=	14,29	min
2 Jan Elmar Sørensen	Treysti	1991	3,26	2,55	5,59	3,00	=	15,20	min
3 Daniel Djurhuus Rein	Vestmanna	1990	3,22	2,49	6,37	2,59	=	15,47	min

Dreingir -17 (f. '86 - '89)		árg.	1.000 m	870 m	1.609 m	840 m		1/10 Marathon	
1 Álvur F. Christiansen	Treysti	1989	3,18	2,42	5,46	2,50	=	14,36	min

Dystir um vikuskiftið

Hondbóltur
1. deild kvinnur

02.11	14.30	Søljan-StÍF
02.11	14.30	VÍF-Neistin
02.11	15.00	Stjørnan-VB

Flogbóltur
Meistaradeild kvinnur

01.11	14.00	Mjølnir-Dráttur
01.11	14.00	ÍF-TB
02.11	14.00	KÍF-Fleyr
02.11	15.00	TB-Mjølnir

Meistaradeild menn

01.11	16.00	Mjølnir-SÍ
02.11	16.00	Fram-Fleyr

Sosialurin

VARPIÐ
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

Vikuskifti
Nr. 208 • leygardagur • 1. november 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

At fara á kópalátur

Kópaveiða var í gomlum døgum vanlig vinna í Føroyum. Eftir veturnætur í ár royndu miðvingar og sandavágsmenn aftur í felag hesa veiðu

Lesið síðu 4 & 5

Alla halgannadagur

Tað flaggar á hálvari stong. Minnir okkum á, at tað eru summi,ið vóru okkara millum fyri einum ári síðan, ið ikki eru meira. Vit steðga á og minnast

MINNINGARDAGUR
Edvard Joensen
edvard@sosialurin.fo

Tað er okkurt ófrættakent yvir einum flaggi á hálvari stong. Har hanga sorgarboð uppivið. Vit steðga á. Vita viðhvørt ikki, hvussu vit skulu taka hesi boðini. Tað veldst alt um, hvussu nær tey ganga.

Tað flaggar á hálvari stong. Fyrst kemur eitt flagg upp. So sær grannin og fer út við sínum. Fer at spyrja, hvørjum flaggað verður fyri. Og skjótt er, so hevur hvør flaggstong í bygdini fingið flaggið á hálva stong.

Jú, tað er so ymiskt, sum svarað verður. Hesaferð er tað tann gamli maðurin, sum í eina tíð hevur verið so ússaligur, at væntandi var, at boð vóru eftir honum.

Tungt er hjá tí, ið av varðar. Men onnur halda sum so, at tað var kanska best, at hann slapp burtur hiðani. Her var ikki nógv at dvølja eftir.

So er tað fyri unglinginum, sum friskur og ferðugur fór av húsum í veitslulagi, og ikki kom aftur uttan í kistu av sjúkrahúsinum. Tað hendi ein ferðsluvanlukka.

Aftur verður flaggað, og hóast úrslitið er tað sama, flaggað verður fyri, eru boðini nógv tyngri, og dámurin gerst nógv daprari í bygdini, enn hann var, tá gamli maðurin fór um leitið.

Her hjá okkum hava vit tann vakra sið, at vit halda alla halgannadag í minni teirra, sum farin eru í yrki sínum á sjónum.

Flaggað verður á hálvari stong um alt landið, og dagurin hevur ein dapran dám. Arstíðin er kanska tann rætta, um so kann sigast. Myrkrið sýgur skjótt samanum, og er veðrið dapurt eisini, verður tað mestum sorgardámur.

Minningarhald verða hildið kring oyggjarnar, og nógv fólk, eisini tey, ið ikki eiga avvarðandi, luttaka í hesum haldum. Soleiðis er siðurin, og soleiðis eigur hann at verða hildin í hevd.

Tað er hátíðardámur yvir løtuni, tá minningarguðstænastan í Havnar Kirkju verður varpað út um landið, og tað kennist mestsum halgibrot at takast við nakað yrki ta løtuna. Ta virðingina, hesi fólkini, ið mint verða, eiga uppiborna, eiga vit ikki at taka frá teimum.

Men onnur kenna ikki henda sið okkara og leggja heldur ikki í hann. Tey gera karneval burtur úr alla halgannadegi og vilja selja gekkaskortar og annað fjas í hesum sambandi. Helst slíkt, sum skal síggja ófantaligt út.

Og hetta er so roynt at fáa hendanveg eisini. Men er higartil afturvíst av føroyingum, hvørs virðing fyri degnum liggur djúpari enn so. Grýlurnar kunnu vit halda okkum til á føstulávint. Tað man vera ríkiligt.

Men eru tað so bara uttaneftirkomandi ávirkanir, sum vilja leggja hendan siðin burtur?

Nei, mugu vit tíverri siga. Tað vísir seg nevniliga, at tað gerast alt fleiri okkara millum, sum missa meira og meira av virðingini fyri hesum degnum og týdningi hansara fyri alla tjóðina.

Aftur er tað handilslig ávirkan, ið ger seg galdandi. Undirhald skal vera, og ikki vísir seg at bera til at leggja ein einasta dag burtur ímillum. Heldur ikki ein slíkan dag sum alla halgannadag. Og als ikki, um tað er so óheppið, at hann fellur á ein leygardag.

Hetta er tekin um ómegd. Mentanarliga ómegd, sum vit øll, ikki bara tey, ið onga virðing hava fyri degnum, men eisini hini, eiga at taka á okkum og tala at.

Vit eiga við spekt og sóma at virða minni teirra, ið undan eru farin. Ikki bara alla halgannadag, uttan hvønn dag alt árið.